## Vágs skúli

# Lærarastarv í Vágs-skúla

### lýst leys til setanar frá 1. august 2009

- Søkt verður eftir einum lærara í fast fulltíðarstarv frá 1. august 2009 fyri lærara, ið fer frá vegna starvsaldur.
- Umsøkjari, ið kann átaka sær at undirvísa framhaldsdeildini í alis/evnafrøði og støddfrøði, hevur fyrimun.

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligur og nærlagdur

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsókn við c.v. og ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi onsdagin 15. mai kl 10.00

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 733030

Vágs-skúli hevur komandi skúlaár umleið 223 næmingar í 12 flokkum og 24 lærarar.

## Vágs skúli
Vágsvegur 32
900 Vágur

Landssjúkrahúsið




# KUNNING í SAMBANDI VIÐ UMBYGGINGINA Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Fleiri deildir fluttar á Landssjúkrahúsinum

Í sambandi við at arbeiðið við at endurnýggja klimaskermin á høvuðsbygninginum ( B-bygninginum) á Landssjúkrahúsinum nú er byrjað, eru nakrar deildir fluttar meðan arbeiðið fer fram.

Kortið omanfyri vísir, hvagar deildirnar eru fluttar.

**G3**
Nakrar funktiónir í medisinska ambulatoriinum á G3 eru fluttar yvir í Bláa ambulatoriið. Tær funktiónir sum eru fluttar, eru reumatologiin, hæmatologiin, onkologiin, nefrologiin, gastroenterologiin og diabetesambulatoriið.

**Ergoterapiin**
Ergoterapiin er flutt til bingjuna eystanfyri Svørtu barakkina. Inngongd er norðanfyri Svørtu barakkina.

**Ljósmøðraambulatoriið**
Ljósmøðraambulatoriið er flutt til bingjuna vestanfyri A-bygningin á parkeringsøkinum framman fyri føðideildina. Inngongd er frá parkeringsøkinum.

**B5 Barnadeildin**
Barnadeildin ( B5) er flutt yvir á A3 í hæddini yvir føðideildini.

**B6 og B7**
B6 og B7 eru fluttar yvir í Svørtu barakkina. Inngongd fyri avvarðandi er á suðursíðuni.

**B8**
B8 er flutt yvir á G3 í nýggja bygninginum.

**Rannsóknarstovan**
5. og 6. mai flytur Rannsóknarstovan yvir í gomlu forhøllina í B-bygninginum.



## Triumph Daytona 675 Sport

**Árg:** 08/2006 **Litur:** Reytt
**Km:** 1.100 **Motor:** 675cc / 128hk

**Prísur. Kr. 90.000,-**
**Tlf.: 21 57 57**




Byrjar 7. mai 2009

RF skeið byrjar 8. mai

Tilmelding á tlf. 216021

KOYRI FRÁLÆRA
Hoyvíksvegur 61 21 60 21
Limur í Føroya Koyrilærarafelag



## Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo